Havbúnaðarfelagið
FAROESE FISH FARMERS

# AÐALFUNDUR HJÁ HAVBÚNAÐARFELAGNUM
# 13. JUNI 2018

# ÁRSFRÁGREIÐING 2017

Faroese Fish Farmers · Smærugøta 9A · P.O. Box 1038 · FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Tel +298 30 99 00 · www.industry.fo

## Frágreiðing frá nevndini

*Framleiðsla og søla*

Framleiðslan av laksi frá føroyska havbúnaðinum var í 2017 góð 71.000 tons í kruvdari vekt, sum er nakað hægri enn í í 2016, tá havbúnaðurin framleiddi góð 70.000 tons. Søluvirðið vaks úr 3,7 mia. kr. í 2016 upp í knappar 3,9 mia. kr. í 2017. Hetta merkir samstundis, at føroyskur havbúnaður stendur fyri knapt helvtini av samlaða føroyska fiskavøruútflutninginum, og laksur er greitt tann største einstaka útflutningsvøran úr Føroyum.

Føroyskur havbúnaður marknaðarførir føroyskan laks sum eina hágóðsku fiskavøru, og prísurin sum føroyskur laksur fær á marknaðinum er eisini hægri pr. kg í mun til laksin hjá fremstu kappingarneytunum. Orsøkin til prísmunin er partvís, at kundarnar seta prís uppá góðskuna á føroyskum laksi og at miðalvektin á føroyskum laksi er hægri enn hjá kappingarneytunum.

Seinastu árini er alsamt størri partur av føroyska laksinum seldur til marknaðir uttanfyri Evropa, serliga Russland, USA og Kina. Í 2008 fór uml. 85% av útflutningsvirðinum av aldum laksi til ES, men hesin partur er seinnu árini minkaður so líðandi, og hóast marknaðarparturin til ES er kvinkaður uppeftir í 2017, er útflutningsvirðið av laksi til ES-lond nú uml. 36% av samlaða útflutninginum.

Henda gongd ger tað eisini uppaftur meira umráðandi, at føroysku myndugleikarnir raðfesta arbeiðið við at betra marknaðaratgongdina til hesar nýggju marknaðirnar, so føroysku fyritøkurnar ikki missa kappingarføri av hesum ávum. At hetta er ein reellur vandi sæst m.a. á kinesiska marknaðinum, har bæði Kili og Ísland hava tollfrælsi fyri sínar laksavørur, og Noreg er í samráðingum um fríhandilsavtalu við Kina. Føroyar hava í løtuni onga handilsavtalu við Kina.

Karmarnir kring framleiðsluna eru annars sum heild góðir, og vinnan hevur seinastu árini havt góð úrslit, tá hugt verður at vøkstri, fóðurfaktori og framleiðslukostnaði. Fellið er eisini á einum lágum støði samanborið við onnur lond, men hevur tó verið hækkandi seinastu árini. Saman við skynsamari lívfrøðiligari stýring hevur ein óvanliga høgur laksaprísur eisini havt við sær, at feløgini hava havt serliga góð fíggjarlig úrslit í 2017.

Fyritøkurnar hava nýtt týðandi part av úrslitinum til at gera íløgur í útbygging av smoltstøðunum, nýggj tænastuskip og tól til ikki-medisinska lúsafyribyrging og -viðgerð. Slíkar íløgur eru viðvirkandi til at minka um lívfrøðiliga váðan, og kunnu geva møguleikar fyri at økja um framleiðsluna á ein burðardyggan hátt við tað, at smoltini eru størri áðrenn tey koma í ringarnar.

Í desember 2017 varð avtala gjørd millum Uttanríkis- og Vinnumálaráðið, Fiskaaling og P/F Bakkafrost um, at P/F Bakkafrost yvirtekur verkætlanina viðvíkjandi føroysku laksastammuni. Við hesum hevur P/F Bakkafrost yvirtikið kynsbótaarbeiðið og rognaframleiðsluna grundað á føroysku laksastammuna.

Umleið 50 tons av tara í vátari vekt vórðu heystað og seld í 2017. Hetta svarar til umleið 5 tons í turrari vekt. Tað mesta varð útflutt, tó at ein lítil partur varð framleiddur og seldur í Føroyum sum turkaðir úrdráttir til matna.

*Lívfrøðiligir váðar*

Laksalúsin er framvegis ein trupulleiki fyri føroyska aling, eins og hon er í laksaframleiðslu kring allan heimin, og eigur trupulleikin framvegis at verða tikin í størsta álvara. Lúsastøðan er higartil í ár frægari enn hon hevur verið tey seinastu nógvu árini, samstundis sum heilivágsnýtslan er minkað í stórum. Orsøkin til positivu gongdina er serliga tær íløgur, sum eru gjørdar við tí endamáli at gera alingina meira burðardygga.

Umframt at framleiða stór smolt, eru feløgini eisini farin undir at nýta m.a. rognkelsi, feskvatnsviðgerð, mekaniska avlúsing og avlúsing við hitaviðgerð til at halda lúsatalinum niðri uttan medisinska viðgerð.

Í 2014 vórðu tey fyrstu rognkelsini sett út í føroyskar aliringar, og rognkelsi verða í dag nýtt sum ein fastur liður í átøkunum móti laksalúsini. Tað er framvegis neyðugt at innflyta rognkelsi til Føroya, tí regluverkið kring rognkelsisframleiðslu í Føroyum ikki er komið uppá pláss. Alifeløgini ynskja, at farið verður undir rognkelsisframleiðslu í Føroyum, fyri at kunna tryggja eina støðuga tilgongd av rognkelsum. Útlit eru til, at regluverk, sum ger tað møguligt at framleiða rognkelsi í Føroyum, er ávegis.

Í 2016 komu nýggjar reglur í gildi við tí endamáli at tálma laksalúsini (kunngerð um yvirvøku og tálming av lúsum á alifiski). Nýggja kunngerðin ásetir m.a. krøv um teljingar av laksalús, markvirði, viðgerðir og um avleiðingar av, at lúsateljingar fara upp um markvirðið.

Í mars 2017 varð ein illgruni um sjúkuelvandi ILA-virus á einum alibrúki staðfestur, og alifyritøkan avgjørdi at taka allan fiskin á alistøðini. Samstundis varð brakkleggingartíðarskeiðið longt. Eingin kliniskur tilburður av ILA hevur verið, og sjúkuelvandi ILA-virus hevur ikki spreitt seg til onnur alibrúk.

Tilbuðir av BKD og hjartaklovningi (CMS) í laksi á føroyskum alibrúkum eru øktir aftur seinastu árini, og útbreiðslan og orsøkirnar til CMS í Føroyum verða nú kannaðar.

*Marknaðarútlit*

Heimsframleiðslan av laksi vaks við uml. 6% í 2017, tó var vøksturin í marknaðarútboðnum bert 2% í mun til 2016. Avmarkaði vøksturin í útboðnum hevði við sær, at laksaprísurin í 2017 í miðal lá á sama høga støði sum í 2016, hóast hann sveiggjaði nógv yvir árið. Heimsframleiðslan av laksi veksur í 2018 væntandi uml. 4% í mun til í fjør. Hesin vøkstur merkir samstundis, at miðalprísurin á laksi í 2018 helst verður eitt sindur lægri enn í 2017. Forward prísirnir á Fish Pool vísa, at prísurin kann væntast at lækka nakað, tað ið eftir er av árinum.

Tað er ivasamt, hvørja ávirkan høgi laksaprísurin kann fáa á marknaðin uppá longri sikt. Høgi prísurin hevur eisini við sær, at íløgur verða gjørdar í alistøðir á landi, eitt nú í USA. Um framleiðslan fæst at virka eftir ætlan, og vøksturin í útboðnum av laksi frá sjógvalingini framvegis verður avmarkaður, kann hetta eggja til, at fleiri slíkar støðir verða bygdar nærhendis stóru marknaðunum í Asia og Norðuramerika.

Hóast prísurin í løtuni er góður, er tó umráðandi at minnast til, at laksaprísurin søguliga sæð hevur sveiggjað nógv, og tí kunnu aftur koma tíðarskeið, tá tað kann gerast torført at vinna pening á marknaðinum.

Í 2017 vórðu umleið 14,5 mió. laksasmolt sett út í Føroyum. Hetta er minni enn í 2016, tá umleið 16 mió. smolt vórðu sett út. Miðal smoltstøddin við útsetu øktist úr 196 g í 2016 upp í 246 g í 2017.

*Skattur og avgjøld*

1. januar 2016 varð enn ein nýggj skipan fyri loyvisskatt fyri laksaalifyritøkur sett í verk, sum legði eitt tøkugjald á havbúnaðarfyritøkur, ið er 4,5% av einum roknaðum søluvirði. Talan er um eina munandi hækking í mun til tað avgjald, sum var galdandi áðrenn. Frammanundan skuldu alifyritøkur gjalda ein eykaskatt á 4,5% av yvirskotinum umframt 0,5% av roknaða søluvirðinum. Sostatt er tað nú einans søluvirðið, sum verður skattað, um so nakar vinningur er ella ikki. Harumframt rinda fyritøkurnar og eigarar tess vanligan partafelags- og vinningsbýtisskatt.

Havbúnaðarfelagið hevur víst á, at tað við nýggju skipanini er reellur vandi fyri, at alifyritøkur noyðast at gjalda skatt, hóast virksemið skuldi givið undirskot. Nevndin í Havbúnaðarfelagnum heldur, at skattur eigur at vera rindaður av yvirskotinum, og ikki av umsetninginum, tí so vita fyritøkurnar, at tær skulu rinda skatt, tá tær forvinna pengar, og ikki tá undirskot er.

Føroysku alifyritøkurnar rindaðu tils. 552 mió kr. í partafelagsskatti, tøkugjaldi og kapitalvinningsskatti fyri árið 2017.

# Innihaldsyvirlit


1. ENDAMÁL HAVBÚNAÐARFELAGSINS ..... 8

2. ALMENT UM GONGDINA Í ALIVINNUNI ..... 9

2.1 Framleiðsla ..... 10
2.2 Útseting av smolti ..... 12
2.3 Útflutningur ..... 13
2.4 Prísir ..... 13
2.5 Býtið av útflutningi ..... 16
2.6. Marknaðir ..... 17
2.7 Býtið seinastu árini ..... 18

3. MÁL FELAGIÐ HEVUR ARBEITT VIÐ Í ÁRINUM ..... 19

3.1 Aliráðstevnan ..... 19
3.2. Seafood Watch og Marine Conservation Society ..... 19
3.3. Vegleiðing um umhvørviseftiransing av aliøkjum ..... 19
3.4. Marine Mammals Protection Act ..... 19
3.5. Útbúgving og førleikamenning av starvsfólki í alivinnuni ..... 20
3.6 Altjóða samstarv ..... 20
3.7. Salmon from the Faroes ..... 20

4. LÓGIR OG KUNNGERÐIR ..... 22

4.1 Løgtingslóg um broyting í alilógini ..... 22
4.2. Kunngerð um broyting í rakstrarkunngerðini I ..... 22
4.3 Kunngerð um broyting í søluprísinum á heilivági ..... 22
4.4. Kunngerð um fyribyrging og týning av rottu. ..... 22
4.5 Løgtingslóg um náttúrumargfeldni ..... 23
4.6. Kunngerð um virking av alifiski í Suðuroy ..... 23
4.7. Kunngerð um broyting í rakstrarkunngerðini II ..... 23

## 1. Endamál Havbúnaðarfelagsins

Havbúnaðarfelagið er vinnugreinafelag hjá føroyskum havbúnaði - bæði á sjógvi og á landi. Endamál felagsins er at fremja tey mál, ið eru av felags áhuga fyri limirnar. Uppgávan hjá felagnum er at menna vinnuna í samstarvi við einstøku limirnar, myndugleikar og stovnar, ið varða av føroyskum havbúnaði.

Felagið heldur til í Vinnuhúsinum og hevur felags umsiting við Føroya Arbeiðsgevarafelag og onnur vinnufeløg.

Í nevndini í Havbúnaðarfelagnum sita:
Atli Gregersen, Luna/Hiddenfjord
Hans Jákup Mikkelsen, Marine Harvest Føroyar
Regin Jacobsen, Bakkafrost

## 2. Alment um gongdina í havbúnaðinum

Gongdin í havbúnaðinum í Føroyum er framvegis góð, og fíggjarligu úrslitini seinastu árini hava somuleiðis verið góð. Karmarnir kring havbúnaðin eru sum heild góðir, hóast vinna og myndugleikar áhaldandi mugu hava eyguni opin fyri møguligum broytingum, ið kunnu gerast til tað betra. Tað er av alstórum týdningi, at havbúnaðurin framhaldandi leggur dent á skynsaman rakstur við neyvari framleiðslustýring.

Føroyskur havbúnaður hevur seinastu árini kunnað víst á nøkur av heimsins bestu úrslitum viðvíkjandi vøkstri, fóðurfaktori, framleiðslukostnaði og prísi. Fellið hevur eisini verið lágt, tó at tað hevur verið hækkandi seinastu árini. Samanborið við aðrar havbúnaðartjóðir hevur føroyskur havbúnaður góð úrslit at vísa á, og tað er eisini grundarlagið undir teimum góðu úrslitunum seinastu árini.

Síðan kreppuna í føroyskum havbúnaði fyrst í hesari øldini, er framleiðslan av alifiski økt støðugt. Framleiðslan í 2017 var góð 71.000 tons í kruvdari vekt, ein lítil vøkstur í mun til tey uml. 70.000 tonsini, sum vórðu framleidd í 2016.

Útflutningsvirðið av laksi var í 2017 uml. 3,9 mia. kr. samanborið við uml. 3,7 mia. kr. í 2016. Samanumtikið hevur 2017 verið eitt gott ár við støðugari framleiðslu og høgum miðalprísi.

Í 2018 verður mett, at útboðið av aldum laksi á heimsmarknaðinum fer at vaksa umleið 4% , í mun til eina útboðsøking á 2% í 2017. Heimsframleiðslan av laksi verður sostatt væntandi á leið 2,4 mió. tons í 2018. Økta útboðið hevur væntandi við sær, at miðalprísurin fyri alt 2018 lækkar nakað í mun til 2017. Samstundis skal tó sigast, at prísirnir higartil í ár hava hildið sær betri enn greinarar væntaðu. Forward prísirnir á Fish Pool vísa tó nakað lægri prísir í seinna hálvári í mun til fyrra hálvár.

Við ásetingum um árgangssundurskiljing, økishvíld og sjúkufyribyrgjandi atburði, verður mett, at alivinnan hevur karmar fyri burðardyggum rakstri. Tað er sera týdningarmikið, at vinnan og myndugleikarnir framhaldandi arbeiða við at betra hesar karmar.

## 2.1 Framleiðsla

### Laksur

Tøkan av laksi í 2017 var knapt 88 tús. tons í livandi vekt, og er hetta eitt sindur meira enn í 2016. Hetta er samstundis tað mesta, sum nakrantíð er framleitt í føroyskum havbúnaði. Í mynd 1 sæst annars, at framleiðslan í alivinnuni síðani kreppuárini fyrst í hesari øldini sum heild hevur verið vaksandi. Seinastu fýra árini hevur tøkan ligið millum 80 og 88 tús. tons í rundari vekt.

Eins og undanfarin ár vórðu eingi síl tikin í 2017.

**Mynd 1. Tøka av laksi og sílum (rund vekt) 2004-2017 (1.000 tons)**




| | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Síl | 5,092 | 4,493 | 5,482 | 7,648 | 9,000 | 8,800 | 2,382 | 0,000 | 0,000 | 0,960 | 0,000 | 0,000 | 0,000 | 0,000 |
| Laks | 40,985 | 18,962 | 13,083 | 22,305 | 38,851 | 51,500 | 45,410 | 60,497 | 76,803 | 75,852 | 86,489 | 80,629 | 85,825 | 86,830 |

Kelda: Rúni Dam, sp/f Avrik.

Mynd 2 vísir tøkuna av alifiski í kruvdari vekt viku fyri viku í 2017. Her sæst, hvussu tøkan av alifiski býtir seg yvir árið. Tað hevur fyrr verið vanligt, at størstu nøgdirnar vórðu tiknar um heystið, men seinnu árini er tøkan býtt meira javnt út á árið, tó at sum heild minni verður tikið á hásumri.

**Mynd 2. Tøka av alifiski (kg kruvd vekt) viku fyri viku í 2017**




Kelda: Havbúnaðarfelagið

## Tari

Uml. 50 tons av tara vórðu heystað í 2017. Hetta svarar til uml. 5 tons í turrari vekt. Tað mesta varð útflutt, tó at ein lítil partur varð framleiddur og seldur í Føroyum sum turkaðir úrdráttir til matna.

## 2.2 Útseting av smolti

Mynd 3 vísir útseting av laksi og sílum síðani aldarskiftið. Myndin vísir, at útsetingin av smolti við ávísum undantøkum er økt støðugt frá 2004 til 2010, men síðani er talið lítið broytt. Útsetingin í 2017 var umleið 14,5 mió. smolt, ein minking á uml. 1,5 mió smolt í mun til 2016. Vert er at leggja til merkis, at útsetingin framvegis er væl lægri, enn hon var árini eftir aldarskiftið, men at munandi meira fæst burturúr tí, sum nú verður sett út. Síðan 2010 eru eingi síl sett út.

Miðal smoltstøddin við útsetu øktist úr 196 g í 2016 upp í 246 g í 2017. Sostatt vórðu færri, men størri smolt sett á sjógv í 2016.

**Mynd 3. Útseting av smolti frá 2000 til 2017**




| | ´00 | ´01 | ´02 | ´03 | ´04 | ´05 | ´06 | ´07 | ´08 | ´09 | ´10 | '11 | ´12 | ´13 | 14 | ´15 | ´16 | ´17 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| mill stk | 19,2 | 20,8 | 20,7 | 8,70 | 2,90 | 4,70 | 9,20 | 9,50 | 8,70 | 11,2 | 14,5 | 12,1 | 15,0 | 13,7 | 14,7 | 15,9 | 16,0 | 14,5 |

Kelda: Rúni Dam, Sp/f Avrik

## 2.3 Útflutningur

Útflutningsvirðið av alifiski var í 2017 knappar 3,9 mia. kr., sum er ein øking á uml. 200 mió kr. í mun til undanfarna ár. Meira varð framleitt, og prísurin helt sær. Um sæð verður burtur frá í 2015, er útflutningsvirðið á aldum fiskavørum økt á hvørjum ári síðani 2005. Seinnu árini er í roynd og veru talan um útflutning av laksi. Laksur er í dag størsta einstaka útflutningsvøran hjá Føroyum og laksur frá føroyskum havbúnaðinum er knapt helvtina av fiskavøruútflutninginum hjá Føroyum.

**Mynd 4. Útflutningsvirðið av alifiski frá 2008 til 2017 (1000 kr.)**




| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| SÍL | 138.618 | 175.082 | 69.954 | 8.724 | 195 | 2.585 | 273 | 152 | 183 | 3.980 |
| LAKSUR | 824.419 | 1.203.595 | 1.338.081 | 1.618.393 | 1.822.514 | 2.456.409 | 2.950.538 | 2.799.127 | 3.661.704 | 3.867.656 |

Kelda: Hagstova Føroya

## 2.4 Prísir

Marknaðarprísurin á feskum laksi hevur aftur hildið sær á einum høgum støði í 2017. Miðalprísurin á feskum føroyskum laksi, sum í 2012 var góðar 28 kr/kg, lá í tíðarskeiðnum 2013-2015 nakað omanfyri 40 kr/kg. Í 2016 fór miðalprísurin tó upp á 55 kr/kg, og hann hevur hildið sær á tí støðinum í 2017 eisini. Eisini prísurin á frystum laksi og á laksaportiónum setti met, tó at vøksturin ikki var líka stórur sum á feskum laksi.

Orsøkin til prísgongdina er m.a., at eftispurningurin eftir laksi er øktur, samstundis sum tað hevur verið torført at økja um heimsframleiðsluna. Vanliga má roknast við, at heimsframleiðslan økist, um príslegan er høg í longri tíðarskeið, men trupult er at vaksa munandi um sjógvalingina, bæði tí at tað tekur tíð at fyrireika nýggj egnaði aliøki, og tí laksalúsin ger tað torført at vaksa munandi um alingina á verandi økjum kring heimin.

Hinvegin verða í hesum og komandi árum gjørdar stórar íløgur í alistøðir á landi ymsastaðni í heiminum, og fleiri av hesum alistøðum verða lagdar nær fjarskotnu marknaðunum, t.d. í USA. Um henda framleiðsla fæst at virka eftir ætlan, kann hetta økja um heimsframleiðsluna í komandi árum.

Mynd 5 vísir ein ársmiðalprís á feskum kruvdum laksi frá 1998 til 2017. Sum myndin vísir, eru nakrir prístindar og nakrar prísgjáir. Tað sæst eisini, at í 2003 var miðalprísurin fyri feskan føroyskan laks einans 16 kr/kg.

Útlitini fyri marknaðarprísinum komandi árini eru sjálvandi nógv tengd at gongdini í samlaðu framleiðsluni í heiminum. Samlaða heimsframleiðslan er serliga tengd at, hvussu tað eydnast at minka um trupulleikan við laksalúsini, sum hevur verið ein avbjóðing um allan heim. Sambært metingum hjá Kontali, fer framleiðslan av laksi at vaksa við uml. 4 % í 2018, og tað skuldi sannlíkt havt við sær, at miðalprísurin fyri 2018 verður eitt sindur lægri í mun til 2017. Tó hevur tað higartil í ár víst seg, at prísurin hevur hildið sær betri enn greinarar væntaðu. Forward prísirnir á Fish Pool vísa, at prísurin kann væntast at lække nakað, tað ið eftir er av árinum.

**Mynd 5. Ársmiðal prísir á feskum kruvdum laksi (ársins prísir). FOB Føroyar**




| | ´98 | ´99 | ´00 | ´01 | ´02 | ´03 | ´04 | ´05 | ´06 | ´07 | ´08 | ´09 | ´10 | ´11 | ´12 | ´13 | ´14 | ´15 | ´16 | ´17 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Prísur | 21 | 24 | 28 | 20 | 19 | 16 | 18 | 22 | 30 | 25 | 24 | 28 | 37 | 31 | 28 | 41 | 41 | 43 | 55 | 55 |

Kelda: Hagstova Føroya

Framleiðslan av laksaportiónum tók veruliga dik á seg í 2003, og mynd 6 vísir miðalprísin á frystum laksaportiónum seinastu tíggju árini. Í 2017 fekst hægsti miðalprísur nakrantíð fyri laksaportiónirnar, tá miðalprísurin var omanfyri 95 kr/kg. Av tí, at prísurin á laksaportiónum í stóran mun verður ásettur í langtíðarsáttmálum, er prísurin ofta meira støðugur enn á øðrum laksavørum.

**Mynd 6. Miðalprísur pr. kg. av frystum laksaflaki (laksaportiónum) 2008-2017.**




Kelda: Hagstova Føroya

## 2.5 Býtið av útflutningi

Mynd 7 vísir býtið av útflutninginum í virði frá 2008 til 2017. Nógv tann størsti parturin er framvegis heilur feskur laksur, sum í fjør hevði eitt útflutningsvirði á knappar 2,8 mia. kr. Síðan 2007 er útflutningurin av laksaportiónum sum heild øktur, og vaks eisini í 2017 við uml. 140 mió kr. í mun til árið fyri. Lítið verður útflutt av heilum frystum laksi.

**Mynd 7. Býtið av útflutningi av laksavørum 2008-2017**




Kelda: Hagstova Føroya

Í mynd 8 sæst prosentvísa býtið av útflutningsvirðinum millum ymisku laksavørurnar. Her sæst m.a. at útflutningsvirðið av heilum feskum laksi nú í fleiri ár hevur verið uml. 70% av samlaða útflutninginum. Laksaportiónirnar hava eisini ligið nokk so støðugt við einum parti á uml. 20-25 % seinastu árini.

**Mynd 8. Prosentbýtið í útflutningsvirðinum av laksavørum**



## 2.6. Marknaðir

Seinastu árini er hend ein globalisering av føroyskum laksaútflutningi. Frá at hava útflutt 85% til ES-marknaðin í 2008, er tann lutfalsligi parturin, sum fer til ES, sum heild minkaður seinastu árini. Ikki tí minni nøgdir vera útfluttar til ES, men tí størri partur av vøkstrinum í framleiðsluni verður útfluttur til marknaðir uttanfyri ES. Vøkstur hevur serliga verið á marknaðunum í USA, Russlandi og Kina. Tilsamans fer uml. 97% av útflutninginum til hesar fýra marknaðirnar.

Í 2017 minkaði parturin ið verður útfluttur til USA og til Kina nakað í mun til árið fyri, meðan útflutningurin til ES og Russlands vaks lutfalsliga. Seinastu tvey árini er niðurgongdin í útflutningspartinum til ES steðgað, og hevur haft hug at kvinka upp eftir aftur, hóast hann framvegis liggur á einum nógv lægri støði enn fyri 10 árum síðani.

**Mynd 9. Býtið av laksaútflutningi á høvuðsmarknaðirnar 2008-2017**




Kelda: Hagstova Føroya.

## 2.7 Býtið seinastu árini

Niðanfyri er eitt samlað yvirlit yvir útflutningsvirði, nøgd og prísir fyri ymsu vørurnar, sum alivinnan framleiðir. Tølini eru fyri seinastu tíggju árini.

Talva 1. Útflutningsvirðið fyri ymsu vørubólkarnar frá 2008 til 2017, í tús. kr. *

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Feskur laksur | 547.364 | 795.934 | 803.161 | 1.113.741 | 1.282.705 | 1.720.921 | 1.970.142 | 1.949.770 | 2.741.263 | 2.781.094 |
| Frystur laksur | 40.826 | 68.587 | 69.508 | 26.508 | 40.018 | 45.235 | 23.257 | 34.902 | 8.390 | 30.731 |
| Laksaportiónir | 213.274 | 303.505 | 423.931 | 428.702 | 447.138 | 618.848 | 852.652 | 693.524 | 777.419 | 916.661 |
| Laksur, annað | 19.927 | 34.703 | 41.482 | 48.332 | 51.599 | 71.406 | 103.545 | 120.930 | 133.999 | 139.170 |
| Síl tilsamans | 138.618 | 175.082 | 69.954 | 8.724 | 195 | 2.585 | 273 | 152 | 183 | 805 |
| **Tilsamans** | **960.009** | **1.377.809** | **1.408.035** | **1.626.007** | **1.821.654** | **2.458.994** | **2.949.869** | **2.799.279** | **3.661.253** | **3.871.636** |

Talva 2. Útflutningsnøgdin fyri ymsu vørurnar frá 2008 til 2017, tons *

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Feskur laksur | 22.681 | 28.489 | 21.541 | 35.549 | 45.067 | 42.312 | 47.565 | 45.329 | 49.854 | 50.340 |
| Frystur laksur | 1.598 | 2.587 | 1.778 | 747 | 1.483 | 1.204 | 611 | 983 | 194 | 560 |
| Laksaportiónir | 4.194 | 5.653 | 6.339 | 5.982 | 7.633 | 9.473 | 10.775 | 8.601 | 9.308 | 9.574 |
| Laksur, annað | 3.280 | 3.835 | 4.037 | 3.977 | 4.881 | 5.922 | 7.918 | 7.189 | 1.918 | 1.827 |
| Síl tilsamans | 6.249 | 7.171 | 2.194 | 238 | 26 | 91 | 15 | 4 | 26 | 8 |
| **Tilsamans** | **38.002** | **47.734** | **35.888** | **46.492** | **59.089** | **59.002** | **66.884** | **62.106** | **61.300** | **62.309** |

Talva 3. Miðal útflutningsprísir fyri ymsu vørurnar frá 2008 til 2017, kr. pr. kg. *

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Feskur laksur | 24,13 | 27,94 | 37,29 | 31,33 | 28,46 | 40,67 | 41,42 | 43,01 | 54,99 | 55,25 |
| Frystur laksur | 25,55 | 26,52 | 39,09 | 35,49 | 26,99 | 37,56 | 38,07 | 35,50 | 43,18 | 54,89 |
| Laksaportiónir | 50,82 | 53,69 | 66,88 | 71,67 | 58,58 | 65,33 | 79,13 | 80,62 | 83,52 | 95,75 |
| Fesk síl | 21,45 | 23,47 | 34,45 | 74,53 | - | 22,47 | - | - | - | 99,56 |
| Fryst síl | 22,28 | 24,78 | 31,90 | 33,58 | - | 28,92 | 18,07 | - | - | - |

Kelda: Hagstova Føroya

* Orsakað av einari broyting í uppgerðarháttinum, kunnu tølini áðrenn 2016 ikki uttan víðari sammetast við tølini í 2016 og seinni

## 3. Mál felagið hevur arbeitt við í árinum

Her er ein stutt frágreiðing um nøkur mál, ið nevndin hevur arbeitt við seinasta árið.

### 3.1 Aliráðstevnan

Havbúnaðarfelagið skipar á hvørjum ári fyri aliráðstevnu, sum tey seinastu árini hevur verið hildin á Hotel Føroyum. Ráðstevnan er vorðin fastur táttur í virkseminum hjá Havbúnaðarfelagnum. Ætlanin við Aliráðstevnuni er at førleikamenna starvsfólkið innan havbúnaðin, og at geva starvsfólkunum og fólki við áhuga í havbúnaði møguleika at hittast og netverka.

Miðað verður eftir at hava eina fjølbroytta skrá, so allir luttakararnir kunnu fáa okkurt burturúr teimum fyrilestrum, ið verða hildnir. Aliráðstevnan var í ár sera væl vitjað við hálvt fjórðhundrað gestum, og meginparturin av framløgunum í ár snúðu seg um úrslit frá føroyskum granskingarverkætlanum innan aling.

Framløgurnar frá Aliráðstevnunum eru at finna á heimasíðuni hjá vinnuhúsinum www.industry.fo

### 3.2. Samstarv við brúkarafelagsskapir

Havbúnaðarfelagið hevur í farna ári samskift við ymiskar non-profit felagsskapir, sum gera óheftar tilráðingar til brúkarar um keyp af fiskavørum, og hjálpt teimum at fáa til vega upplýsingar um føroysku alivinnuna. Hetta virksemi heldur fram í 2018.

### 3.3. Vegleiðing um umhvørviseftiransing av aliøkjum

Umhvørvisstovan tók í 2016 stig til at endurskoða galdandi vegleiðing um umhvørviseftiransing av aliøkjum. Havbúnaðarfelagið tók undir við, at vegleiðingin varð endurskoðað, og hevur luttikið í fyrireikandi arbeiðinum. Nýggja vegleiðingin kom í gildi í mars mánaða í 2018.

### 3.4. Marine Mammals Protection Act

Amerikanskir myndugleikar hava sett krav um, at øll lond, sum vilja útflyta fiskavørur til USA eftir 1. Januar 2022 skulu hava eina váttan um, at teirra reglur um verju av havsúgdjórum í sambandi við fiskiskap og aling eru sambærligar við amerikansku reglurnar

(comparability finding). Tað er tí neyðugt hjá føroyskum myndugleikum at fáa eina slíka váttan, um vit framhaldandi skulu útflyta fiskavørur til USA aftaná 1. Januar 2022.

Uttanríkis- og Vinnumálaráðið hevur ábyrgdina av góðkenningini viðv. alingini, meðan Fiskimálaráðið hevur ábyrgdina av góðkenningini viðv. veiddum fiski. Bólkur við umboðum úr Uttanríkis- og vinnumálaráðmnum, Fiskimálaráðnum, Havbúnaðarfelagnum og Náttúrugripasavninum samskipar arbeiðið.

Ein avleiðing av nýggju krøvunum er, at tað í alilógini er sett krav um, at alifeløgini skulu skráseta allar tilburðir, sum hava við sær, at kópur doyr í sambandi við aling, antin tilætlað ella ótilætlað. Hesar skrásetingar skulu síðani sendast Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Í summarhálvuni 2018 verða stovnsmetingar eisini gjørdar av føroyska kópastovninum.

### 3.5. Útbúgving og førleikamenning av starvsfólki í alivinnuni

Havbúnaðarfelagið fyrireikar eina verkætlan um útbúgving av starvsfólki til alivinnuna. Samstarvað verður við ymsar partar í Føroyum og uttanlands.

### 3.6 Altjóða samstarv

Havbúnaðarfelagið er limur í altjóða felagsskapunum ISFA (International Salmon Farmers Association), og luttekur aktivt í tí netverkinum.

### 3.7. Salmon from the Faroes

Felagið eigur og rekur heimasíðuna Salmon from the Faroe Islands (www.salmon.fo). Tað koma javnan fyrispurningar um føroyskan havbúnað gjøgnum hesa síðuna, bæði frá keyparum og frá endabrúkarum. Fyrispurningarnir kunnu í stórum býtast í tvey: Fyrispurningar um keyp av føroyskum laksi og fyrispurningar um, hvussu framleiðslan er skipað. Undir hesum síðsta eru eitt nú fyrispurningar um fóður, heilivágsnýtslu, ymisk úrslit frá yvirvøkuskipanum o.s.fr. Í hesum sambandi er tað ein stórur fyrimunur fyri føroyskan havbúnað at kunna vísa á, at einki antibiotika verður nýtt, og at fóðrið er non-GMO.

# 4. Lógir og kunngerðir

Síðan seinasta aðalfund eru hesar lógir og kunngerðir, ið hava týdning fyri alivinnuna, settar í verk ella hava verið til viðgerðar:

## 4.1 Løgtingslóg um broyting í alilógini

Galdandi løgtingslóg um aling av fiski v.m. varð broytt við løgtingslóg nr. 50 frá 30. Apríl 2018. Umframt ymiskar tekniskar broytingar og nágreiningar í mun til eigara- og loyvisviðurskifti, snúðu broytingarnar seg í høvuðsheitum um at broyta fyrisitingarliga prinsippið "Ein alari, ein fjørður", so betri møguleiki verður at geva loyvi til aling av skeljum og tara, og til aling á landi. Eisini var ein høvuðsbroyting, at fiskur, sum verður aldur í Suðuroy, eisini skal virkast í Suðuroy.

Harumframt er nú krav, at laksaalarar skulu skráseta og fráboða alla tøku av kópi, og hendingar, har kópur doyr av øðrum áðum.

## 4.2. Kunngerð um broyting í rakstrarkunngerðini I

Við kunngerð nr. 176 frá 29. Desember 2017 varð kunngerðin um sjúkufyribyrgjandi rakstur av alibrúkum broytt soleiðis, at frá 1. januar 2018 skulu upplýsingar um lúsatøl, viðgerðir, v.m. hjá laksaalibrúkum almannakunngerast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Eisini skulu avgerðir um slátur og/ella lækkaða útsetu almannakunngerast í samandrátti.
Tá tað snýr seg um aling av tara og tvískeljum, skulu avgerðir, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur tikið, almannakunngerast.

## 4.3 Kunngerð um broyting í søluprísinum á heilivági

Við kunngerð nr. 72 frá 7. mai 2018 varð kunngerðin um áseting av søluprísinum á heilivági broytt, so avslátturin minkaði úr 15 % niður í 14 %. Orsøkin til broytingina var sum skilst, at føroyskur havbúnaður brúkar so nógv minni av heilivági, at Heilsu- og Innlendismálaráðið valdi at minka avslátturin, við atliti til raksturin av apoteksverkinum.
Havbúnaðarfelagið gav hoyringssvar til kunngerðina.

## 4.4. Kunngerð um fyribyrging og týning av rottu.

Við kunngerð nr. 147 frá 16. november 2017 vórðu krøv sett um, at allir eigarar og leigarar av fastogn, íroknað fastar og flótandi eindir á sjónum, so sum fóðurflakar o.tíl., skulu tryggja, at rotta hvørki sleppur inn ella støðast millum m.a. bygningar, úthús, rør,

fóðurflakar, før o.a., og at tilfar og leivdir, sum kunnu draga rottu at sær, verður beint burtur.

Havbúnaðarfelagið hevði ongar viðmerkingar til kunngerðina, tá hon var til hoyringar.

### 4.5 Løgtingslóg um náttúrumargfeldni

Uppskot til nýggja náttúrmargfeldislóg var sent til ummælis í apríl 2018. Uppskotið er gjørt við fyrimynd í norsku naturmangfoldloven, er umfatandi í vavi og regulerar nógv ymisk náttúruviðurskifti. Torført er enn at siga um ella hvussu nýggja lógin fer at ávirka føroyskan havbúnað, tí tað eisini er tengt at tí praksis, sum verður løgd frá umhvørvisfyrisitingini og kærumyndugleikum.

Við lógini verða ymisk nýggj prinsipp sett í verk, sum ætlandi skulu vera leiðbeinandi fyri umsitingina av hesari lógini og øðrum lógum eisini. Dømi um hetta er fyrivarnisreglan.

Í sínum hoyringssvari hevur Havbúnaðarfelagið lagt dent á, at umhvørviskrøv mugu vera saklig, gjøgnumskygd og grundað á vísindaliga vitan, og at orka má vera til at umsita lógina.

Væntandi verður lógaruppskotið lagt fyri Løgtingið í heyst.

### 4.6. Kunngerð um virking av alifiski í Suðuroy

Uppskot til kunngerð um virking av alifiski í Suðuroy varð sent Havbúnaðarfelagnum til hoyringar. Í kunngerðini verða krøvini um virking av alifiski í Suðuroy, sum vóru samtykt við broytingini í alilógini, nágreinaði.

Kunngerðin var enn ikki komin í gildi, tá aðalfundurin hjá Havbúnaðarfelagnum varð hildin.

### 4.7. Kunngerð um broyting í rakstrarkunngerðini II

Uppskot til kunngerð um broyting í kunngerð um sjúkufyribyrgjandi rakstur av alibrúkum, so til ber at ala rognkelsi á Svínoyarvík, varð send Havbúnaðarfelagnum til hoyringar.

Kunngerðin var enn ikki komin í gildi, tá aðalfundurin hjá Havbúnaðarfelagnum varð hildin.